## Bunkring av sóttreinsaðum vatni í Ánunum

Klaksvíkar Kommuna kann nú bjóða 450.000 litrar av sóttreinsaðum vatni við Góðshavnina í Ánunum.. Sóttreinsaða vatnið kemur úr goymslubrunnum við Ánagjógv. Vatnleiðingin oman til góðshavnina er íbundin verandi høvuðusvatnveiting, ið veitir drekkivatn til eystara armin í Klaksvík. Tænastan fer uttan iva at koma eitt nú sildaskipum, ferðamannaskipum og størri trolarum til góðar



## MjúS heldur steðg í ár

Festivalurin á Sandi, MjúS, verður ikki hildin í ár. Fyrireikararnir siga soleiðis: - Tað týdningarmesta fyri okkum, sum hava skipað fyri MjúS, er, at gestir okkara fáa eina góða uppliving. Vit vilja, at tónleikur, hugni og náttúra ganga upp í eina hægri eind. Hetta er eydnast tvær ferðir. Men, av tí at vit undir fyrireikingunum til hetta summarið ikki kenna okkum sannførd um, at vit fáa givið MjúS-gestum eina eins góða uppliving sum undanfarnu árini, hava vit valt at steðga á í eitt ár, og síðani byggja upp til at koma sterkt aftur komandi ár.

# kroyst





*Heri Ellingsgaard, sum hevur verið umsjónarmaður á Klaksvíkar Sjúkrahúsi síðani 1984, sigur at heilsuverkið má innrætta seg til nýggjar tíðir við vitandi sjúklingum og mobilum starvsfólkum*

*Myndir: Høgni Thomsen*

havt stuðlað mær, tá eg var harðast kroyst.

Nýggja sjúkrahúsálitið er eitt úrslit av samstarvi millum lokalu leiðslurnar, og Heri Ellingsgaard heldur, at í dag ber betri til at snakka um tingini.

- Tað má bera til at føra landspolitik og fáa neyðugu broytingarnargjøgnumførdar, uttan at øll skulu fara upp at rópa, sigur hann. Klaksvíkar Sjúkrahús er í serligari støðu, men eg haldi vit kunnu tryggja okkara støðu við dialogi og samstarvi.

- Nýggja sjúkrahúsáliti er eitt dømi um hetta. Vit vera í framtíðini bæði nærsjúkrahús fyri Norðoyggjar og stóran part av Eysturoynni. Og so skulu vit eisini standa fyri allari dagkirurgi.

### Frá valdsmiklum læknum til vitandi sjúklingar

Nógv er broytt hesi síðstu hálvtrýss árini, ikki minst í hugburðinum hjá fólki.

- Læknarnir høvdu nógv meir vald fyrr, sigur Mamy Rasmussen. -Vanliga starvsfólki hevði ikki annað at gera enn at makka rætt. Og fólk høvdu stóra virðing fyri læknanum, hann var næstan gud.

- Í dag er nógv øðrvísi. Men eg haldi tað hevur týdning at halda fast við, at bæði starvsfólk og sjúklingar mugu verða vird, sigur fyrrverandi umsjónarkvinnan á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Heri Ellingsgaard sigur, at nýggju tíðirnar stilla onnur krøv til heilsuverki. Fólk eru ikki so autoritetstrúgv longur, og tey finna seg ikki í øllum.

- Størsta avbjóðingin í dag er vitandi sjúklingurin. Fólk eru lærd og duga sjálv at seta seg inn í tingini. Tá ein sjúklingur fær eina diagnosu, fer hann heim og leitar á internetinum. Hann finnur mail klubbar og onnur, sum feila tað sama sum hann. Tá hann so ein mánað seinni kemur aftur til viðgerð, veit hann meira um sína egnu støðu enn bestu serlæknar.

- Økta vitanin gevur sjúklinginum størri vald. Hetta má heilsuverki innrætta seg eftir og vera meir málrættað og betri samansjóðað, sigur Heri Ellingsgaard at enda.

## Skilji ikki, at eg orkaði

Mamy Rasmussen var 29 ára gomul, tá hon byrjaði sum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í 1955. Hon hevði tá arbeitt sum roknskaparfólk á Landsjúkrahúsinum í eini tvey ár, og áðrenn tað hevði hon arbeitt hjá sýslumanninum í Klaksvík í sjey og eitt hálvt ár.

Mamy greiðir frá, at hon nokk varð vald til starvið í Klaksvík, tí at tað hevði gingið so væl at fáa skil á roknskapin á Landsjúkrahúsinum. Henni dámdi tøl og ræddist ikki konfrontatiónir.

- Eg minnist til dømis eina ósemju, sum vit á Landssjúkrahúsinum høvdu við gjaldstovuna um toll á hygieinubindum. Teir vildu hava tey tollað sum toyvøru, men tað fann eg meg ikki í. Og eg vann tað sakina.

Stutt áðrenn Mamy kom til Klaksvíkar, var hon send norð við Reyða Krossi við einum neyðagregati. Læknastríðið var upp á tað harðasta, og fult av fólki var á keiini, tá báturin legði at.

- Tey vildu ikki hava kassan í land. Tey ákærdu meg fyri at vilja smugla lækna norð. Onkur rópti, at hol var í kassanum, so læknin kundi anda. Tað endaði við, at eg sjálv slapp í land, tí eg var klaksvíkingur. Men hvørki kassin ella danska sjúkrasystirin, sum var við, sloppu í land.

Mamy Rasmussen tosar um tey fyrstu árini á sjúkrahúsinum sum ta góðu tíðina. Tá læknastríðið var av, valdaði friður og tøgn. Mamy sigur, at henda tíðin var merkt av trivnaði og góðum samstarvi. Seinni kom tað veruliga stríðið, og sum Mamy minnist aftur á tey seinnu árini, skilur hon ikki, at hon orkaði.

- Tey síðstu árini vóru ræðulig. Tá eg misti mannin í 1982, høvdu læknar og politikarar langt síðani lagt meg á ís. Tá orkaði eg ikki meira, men álíkavæl ynskti eg ikki at fara frá. Í dag dugi eg tó væl at síggja, at avgerðin at seta Hera Ellingsgaard var tann rætta. Og hann hevur eisini roynst sjúkrahúsinum sera góður, sigur 80 ára gamla Mamy Rasmussen at enda.